## Avbjóðingar úr Jákupsbrævinum

# Á ferð inn í Jákupsbrævið

- Rithøvundur:
  "Jákup, tænari Guðs og Harrans Jesu Krists"
  - Jákup, sonur Sebedeus?
  - Jákup, sonur Alfeus?
  - Jákup, bróðir Jesu
- Móttakarar?
  - Tær tólv ættirnar, sum eru spjaddar um
    í fremmandum londum (Ják 1,1)
- Tíð og stað
  - Jerúsalem í ár 40-62, helst áðrenn 48
- Høvið og endamál



# Innhaldsyvirlit – eitt boð

- 1,1: Fororð
- 1,2-18: Trúfesti í royndum
- 1,19-2,26: Trúfesti í gerningum
- 3,1-4,12: Ávaring móti ósemjum
- 4,13-5,11: Guds vald og dómur
- 5,12-20: Endi

# Á ferð inn í Jákupsbrævið

- Okkara lív skal svara til tað, vit trúgva á
- Heildarlívið skal livast:
  - í royndum (1,1-4.12.15)
  - í gerðum, so tey ikki bara hoyra og men eisini gera eftir orðinum (1,19-27).
  - yvirfyri teimum ríku, so tey ikki verða viðfarin øðrvísi enn onnur (2,1-13)
  - við ikki at skilja trúgv og gerningar (2,14-26)
  - við at stýra tunguni (3,1-12)
  - við at temja girndirnar (4,1-17)
- Ein rein og lýtaleys gudsdýrkan fyri Guði og faðirinum er hetta: at vitja faðirleys og einkjur í trongd teirra, og at varða seg sjálvan óspiltan av heiminum. (1,27)

Men verðið slíkir, sum gera eftir orðinum og ikki bert hoyra tað og við tað svíkja tykkum sjálvar. (Ják 1,22)

# Hoyr orðið
# Tak ímóti orðinum
# Liv orðið út

- Gera eftir orðinum
- Guð stendur dramblátum ímót, men eyðmjúkum veitir hann náði. (Ják 4,6)



# Kvirra og samtala

- Kvirra meðan vit hugsa um:

  Hvat hindrar Guds orði at festa røtur og bera ávøkst í lívi okkara?

- Eftir kvirrunum tosa vit saman um sama spurning.

# Hvat sært tú í speglinum?

- Tí at um einhvør hoyrir orðið og ikki ger eftir tí, tá er hann líkur manni, sum skoðar sín náttúrliga andlitsskap í spegli; v24 tí at hann skoðar seg sjálvan og fer avstað og gloymir við tað sama, hvussu hann sá út. (Ják 1,23-24)
- Tí at Guðs orð er livandi og máttmikið og hvassari enn nakað tvíeggjað svørð, og fer inn ígjøgnum, til tað skilir sál og anda, liðir og merg, og dømir hugsanir og ráð hjartans. (Hebr 4,12)

